LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

SAAB 9000GL
árg. 1986 bíliga til sølu. Nýggj dekk, nýggjan kølara og nýggjar forlyktir. Pikadekk fylgja við. Krevur smáar ábøtur. Gev eitt boð.
Tlf. 317065 ella 352327

TIL SØLU
Eykalutir til Mitsubishi L300 4 x 4 td. Turbodiesel motorur og gearkassi og mangt annað.
Tlf. 422203 ella 722203

FELGUR
4 felgur og 2 dekk til sølu. Dekkini eru 155/80 x 13 og felgurnar hava 4 x 100 ímillum holini. Bíliga til sølu.
Tlf. 224056

JEEPUR
Nissan Terrano 2.7 árg. 99 til sølu.
Tlf. 333270 ella 282071

TIL SØLU
Nissan Patrol árg. 88 krevur ábøtur. Stell v/ motori og gearkassa til Nissan Patrol. Rover Vanden Plass árg. 82 krevur ábøtur. Selist samlað ella hvørt sær.
Tlf. 423442 eftir kl. 18

VOLVO 340 1.4
árg. 1987 til sølu fyri 6.900 kr. Pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 455844

TOYOTA COROLLA
árg. 91 við lítlum skaða til sølu fyri 12.000,- kr.
Tlf. 317801/217803

PEUGEOT 205 GTI
og 5 sportfelgur við breiðum dekkum er til sølu sera bíliga.
Tlf. 504805

BMW 325 TD
svartur, árg. 94, 165.000 km í sera góðum standi, nógv eykaútgerð.
Tlf. 210762

FORD CAPRI 2.8
V6, árg. 1979, 13" alu fælge, motor kørt 60.000 km, nye dæk, bremser, trænger til istandsættelse – giv et bud.
Tlf. 421255/221910

HONDA ACCORD 2.0i LS
árg. 97, var til Tidy Car í des. 2002.
Ring á 222550 ella 322573

SPORTFELGUR
17" sportfelgur til sølu fyri kr. 3.500,00 kunnu brúkast til Mazda Premacy.
Tlf. 510042

TOYOTA CARINA E
Ein Toyota Carina E 2,0 Turbo Diesel. Árg: 7/1996, koyrt ca. 130.000 km til sølu!
ring telf. 252421

NISSAN TIL SØLU
Nissan Sunny Coupé 1600, árg. 88 til sølu, krevur smærri ábøtur, pikadekk á felgum fylgja við.
Ringið 216046 eftir kl. 17

TOYOTA CARINA 2.0 TD
árg. 4/97 hevur koyrt 115.000 km, blá/grønur til sølu.
Tlf. 317367/263817

FORD ESCORT
árg. 88, 2 hurðar, nýggjar hurðar, sportfelgur + vel, bíliga til sølu.
Tlf. 210560

TIL SØLU
VW Passat árg. 89 í góðum standi, ongan rust, til sølu.
Tlf. 210560/423572

VW PASSAT MOTORUR
ynskist, árg. 90.
Ring 210560

NISSAN BLUEBIRD 2.0 SLX
árg. 89, cd-anlegg og góð heilársdekk. Prísur 3.600,-
Tlf. 210808/314198

HVÍTUR TOYOTA CAMRY
árg. 86 til sølu fyri hægsta boð. Koyrir væl, sær gott út. Nógv eyka fylgir við, cd-spælara.
Tlf. 455582 ella 443263

MAZDA 323 1.3
árg. 08/87 v/ aut. gearum til sølu. Hevur koyrt 99.500 km, sýnaður 14.4.03 og onki rustaður, koyrir væl. Prísur 15.000 kr.
Tlf. 506677 eftir kl. 16

SUBARU 4 WD
Ein Subaru 4WD frá 88-89, heilt bíliga til sølu, góðar hurðar og baklúku, ein góður motorhjelmur fylgir við, bakhjólsleigi er brotið.
Tlf. 223419

EYKALUTIR
til Honda Accord, árg. 88 ynskjast til keyps.
Tlf. 229987

EYGNALOK
til Mazda 323 árg. 1999 til sølu fyri 400,- vegna feilkeyp.
Tlf. 281790

FORD ORION 1.6
árg. 93, km 110.000, til sølu fyri 18.000,-
Tlf. 211046

BMW 316i
árg. 10/96, km 124.000, silvurgráur. Hevur vel, tokulyktir, el rútar framman, el spegl.
Tlf. 255995 ella 255913

OPEL VECTRA DIESEL
árg. 99, 2.0 DTI, km 67.000, 100% í ordan, vælhildin. Stendur hjá Bilfrúkan.
Tlf. 221021

PEUGEOT
1.8 TD, árg. 97 til sølu fyri 120.000,- Í sera góðum standi.
Ring 226750

CAMPINGVOGNUR TIL SØLU
Campingvognur til sølu. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 317765 eftir kl. 16

FORD ESCORT
frá 1992 er til sølu fyri biligan prís. Ring og hoyr nærri á
tlf. 441977 ella 229610

BMW DIESEL TIL SØLU
Bilurin er frá 30.12.86. Ring og hoyr meiri.
Tlf. 220955

STYLING TIL COROLLA
spoylarasett v/ tokulyktum og síðushirt til Corolla E11 HB 98-99 til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 254584

CITROEN XSARA TIL SØLU
árg. des. 2000, koyrt 36.000 km, 145.000 kr. Xsara 2000 HDi Turbo, koksgráur, sportfelgur, góð pikadekk á felgum og eyka summardekk.
Tlf. 314415/243134

NISSAN KINGCAB
til sølu, árg. 86, koyrt 232.000, nýsýnaður, matt svartur, trælast, nakrir nýggir deilir fylgja við. Ein bilur til eykadeildir fylgir við.
Tlf. 448517 ella 256509

OPEL VECTRA
til sølu sum eykalutir fyri 1500,-
Tlf. 509169 ella 263862

EYKALUTIR
Ein Hyundai Sonata til sølu sum eykalutir.
Tlf. 221123

OPEL CORSA TIL SØLU
Ein vælhildin Opel Corsa til sølu.
Tlf. 221123

Amboð

BRØYT TIL SØLU
BRØYT X 20 og søla. Eykalutir fylgja við. Áhugaði kunnu ringja á
tlf. 218328

HOBBY-SVEISIAPPARAT
bíliga til sølu. Apparati brúkar pulvurtráð og sveisar væl 1 mm. til uml. 3 mm tjúkt jarn.
Tlf. 224056

BRÚKTAR BYRSUR
í góðum standi verða keyptar.
Pf. Jógvan Weihe, tlf. 213897

ELDRI JARNSTIGI
í 2 sektiónum, max. longd 6.60 m. bíliga til sølu.
Tlf. 213058

ALUMINIUMSSTIGI
(Wibe) 8 m. sera lættur, 1 ára gamal til sølu fyri kr. 2.000,-
Tlf. 213058

Arbeiði

GRÓT OG BETONG
Tilboð ynskist upp á grót og betongarbeiði við hús í Norðurstreymoy.
Ring 214604

ÁLÍTANDI GENTA/KVINNA
søkist til at passa Lisu 11 ár og Jónathan 9 ár, skiftandi arbeiðstiðir.
Ring 509627 ella 310627

HEY!
Eg eri ein 19 ára gomul genta við søki arbeiði fyrrapart aðru hvørja viku.
Tlf. 269446

AVLOYSARI TIL BÓKHALDSSTOVU
Royndir við at bókaað, og halda bókhald ajur, er ein fyrimunur. Arbeiðistiðirnar eru fleksiblar og fevna um 20-30 tímar um vikuna. At byrja uml. 1. september, ella eftir avtalu. Umsókn kann sendast til
Dambók, Postboks 193, 110 Tórshavn ella T-post: da

Barnaansing

EG ERI EIN
sera fitt genta á 17 mðr., sum fegin vil hava eina damu/gentu til at ansa eftir mær frá kl. 9.30 til 17.00 meðan mamma og babba eru til arbeiðis.
Vinarliga ring 332324 ella 211445

HVØR KANN
ansa eftir Elsu (nú 6 mðr.) hálvan dag frá desember/januar. Vinarliga ringið
tlf. 321702

GENTA/KONA SØKIST
at ansa 8 mðr. gomlu Biritu frá 1/2 september.
Ring 312077/229454

KVINNA YNSKIST
at passa 5 mðr. gomlu Jónu, 8 tímar um dagin frá 1. september.
Tlf. 311770/256340

AU-PAIR Í ÍSLANDI
Vit eru hjún við tveimum dreingjum á 3 og 5 ár, ið sóknast eftir gentu 18 ár ella eldri at ansa børnunum og gera lætt húsligt arbeiði. Vit búgva í Keflavík, tú fært bil til fría nýtslu og møguleika fyri at taka skúlatímar við síðuna av.
Áhugað ring 373976 ella 229215

Barnaútgerð

GRULVIGARÐUR
Hjól undir. Kann klappast saman. Veggir kunnu takast niður. Prísur 300 kr.
Tlf. 311430

TVÍBURASTÓLUR - EMMALJUNGA
Góður myrkabláur tvíburastólur av slagnum Emmaljunga til sølu fyri 1500 kr. Er væl egnaður sum systkinastólur.
Tlf. 320302

TIL SØLU
Barna rimasong til sølu.
Tlf. 319103

TIL SØLU
Barna etagusong, 1.100,- kr. ella boð.
Tlf. 215570 ella 522070

TIL SØLU
Brio koyristólur við kurv, regnslag og selum kr. 1.500,-
Tlf. 318279 eftir kl. 17.00

SIMO KOYRISTÓLUR
hevur alustell og lufthjól, við fylgir koyriposi, regnslag og puslitaska – lítið bróktur – 2.400 kr.
Tlf. 373206

SIMO BARNAVOGNUR
Ein svartur Simo barnavognur v/ lufthjólum og alu stell + regnslag og ein líftposi, bert brúkt til 1 barn, fyri 4500 kr.
Tlf. 423458/220018

TIL SØLU
Ein Simo koyristólur fyri 500 kr.
Tlf. 423258

TIL SØLU
Bilbarnastólur frá 0-13 kg. bíliga til sølu.
Tlf. 313940

MYRKABLÁUR
Odder barnavognur til sølu.
Ring 451080 ella 224758

MYRKABLÁUR BRIO
koyristólur við kalesju og posa til sølu. Bert brúktur til eitt barn. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 318217 ella 518217

BILSTÓLUR YNSKIST
0-10 kg. ynskist til keyps.
Tlf. 422405

TIL SØLU
Rimasong við madrassu 350,- kr. Trappuportur 300,- kr. Shoppari 200,- kr. Bilbarnastólur 0-13 kg. við kalesju 200,- kr.
Ring 312568 eftir kl. 18

KLAPPSTÓLUR
Eigur nakar ein klappstól at selja ella leiga mær? Stólaryggurin skal kunna leggjast niður. Vit skulu hava hann við at ferðast 2 vikur í september.
Tlf. 315661

ER TAÐ NAKAR
ið hevur ein leðurlook koyristól við kalesju at selja okkum.
Vinarliga ring 319197

TIL SØLU
Hvítur og bláur koyristólur v/ kalesju, sær út sum nýggjur 1.500,- kr. 1 hoppireiggja 200,- kr.
Tlf. 508142

Bátaútgerð

GLASFIPURBÁTUR
28 fót glasfipurbátur, vælútgjørdur við línuspæli, trakt og snellum til sølu, figging er í bátinum.
Tlf. 210670

PÁHANGSMOTORUR
Brúktur páhangsmotorur – Mariner 9.9 HK til sølu.
Tlf. 421683

ER TAÐ NAKAR
ið hevur ein AVI 27 við húsi aftan at selja mær, so ring
507990

HUMMARARÚSUR
Hummararúsur ynskjast til keyps.
Tlf. 310245 ella 210245

BÁTUR TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er ein Stigfjord 28 til sølu. Nýggjan motor, nýggj el skipan.
Tlf. 327069 ella 287069

BÁTUR YNSKIST
Hevur tú ein bát liggjandi ið tú ikki brúkar, eitt 8-mannafar e.l. eri eg sera áhugaður at læna hann til hobbybrúk fyri ein sámuligan pris.
Tlf. 210135

LEYSAMOTORUR TIL SØLU
25 Hk MERCURY leysamotorur við tanga til sølu fyri kr. 10.000,00.
Tlf. 571558

PÁHANGSMOTORUR TIL SØLU
40 HK Evinrude bíliga til sølu.
Ring 227227/224974

FISKILOYVI TIL SØLU
Eitt fiskiloyvi í bólki 4A – 79 dagar á innaru leiðum + 30 dagar á FB verður lýst til sølu.
Tlf. 312238

YNSKIST TIL KEYPS
Ein TOMOS 4 hk uttanborða motorur, luftkoldur, ynskist til keyps.
Tlf. 422146

6-MANNAFAR TIL SØLU
við 10 HK Saab Diesel motori, fiskiloyvi fylgir við. Áhugaði kunnu ringja
tlf. 371364

GERIÐ KVETTI
so kanst tú ogna tær eina sera bíliga Pioner jollu. Hon er í finasta standi, so gott sum onki brúkt.
Tlf. 320543 ella 213490

Bingo

BINGO VERÐUR
í Pálsstovu leygardagin 23. august kl. 15.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar, 15 plátur fyri 100 kr. Á lutaseðli m.a. 2 x 500 kr. 1 x 1.000 kr. og 1 x 2.000 kr. Bingola, eyka spæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 28. august kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 25. august, kl. 19.00. 15 plátur 100 kr. Gávukort til fulla plátu. - Eisini verður eykaspæl og bingola.
Ástma- og Allergifelagið

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 8. september kl. 19.00 12 plátur 100 kr. Drigið verður ímillum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 24. aug. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur gávukort á 1500 kr. Eykaspælið 2000 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

Bøkur

SKEMT 91 YNSKIST
Er tað nakar, (handlar ella privat) sum liggur inni við eini ella fleiri av Skemt 91 árganginum hjá Óla Petersen í Sosialinum.
Ringið 211820

TIL SØLU
Lademans leksikon 1-22 til sølu fyri 500,- kr. ella boð.
Tlf. 522070

FLESTU BØKURNAR
til 2 HH á Handilsskúlanum eru til sølu fyri hálvan pris.
Tlf. 213231

BRÚKTAR BØKUR
til FHS & HH bíliga til sølu.
Ringið 443147

BØKUR TIL 2 HH
til sølu.
Tlf. 315616/220566 Pætur

SKÚLABØKUR
Skúlabøkur til sølu.
Tlf. 316883

ÁRETS BEGIVENHEDER
8 bind av Árets Begivenheder í billeder til sølu fyri 1.000 kr. 1 Bibilleksikon 12 bind (óbrúkt) til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 312981

Burturm. /funnið

FØROYSK BUNDNATURRIKLÆÐ
burturmist á ólavsøku. Um nakar hevur funnið tað, vinarliga ring
tlf. 319735

UR BURTURMIST
á regattaini Eiði-Hósvík-Nólsoy.
Vinarliga ring 269229

BARNABELTI
við silvurknappaspenni mist á ólavsøku.
Tlf. 312176

SILVURARMBAND FUNNIÐ
á ólavsøku »bløð, smáar greinar« mynda armbandið.
Tlf. 315622

EG HAVI MIST
eina Nokia 3410 (grøna) á Ovastevnu. Hevur tú funnið hana, so vinarliga ring
tlf. 421451

TANN
15. aug. millum kl. 18.30 og 19.30 bleiv mín elskaða Ketta, Speedy, funnin við Hoyvíksveg 45. Um nakar kennist við at hava koyrt á hana, so vinarliga ring til mín. Hon var svørt við hvítum trýni, búki og labbum. Hon átti reytt hálsband sum eg ongantíð fann. Eg vóni at tú ringir.
Tlf. 252819, 504388 ella 210450

BILLYKIL VIÐ
einum lykli hangandi í burturmistur í Fuglafirði 2. august.
Tlf. 268279

Býli

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð í Havnini til útleigan í 4 mðr.
Jonfinn@ofir.dk

FAMILJA
búsitandi í Ársrhus ynskir hús ella íbúð í Tórshavn til leigu. Vinarliga ring
0045 86280589 ella 264909

ROOM-MATE SØKIST
Eg mangli ein at deila íbúð við frá 1. sept. til 1. jan. 04. Íbúðin er 84 fermetrar og liggur tætt við Metro og Amagercentrið. Kostnaður 3.500,- um mánaðin incl. el og hita.
Tlf. 229597, Guðrun

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
Góð og ljós íbúð í Havn til leigu til eitt ella tvey fólk frá 1. september til 20. desember 2003. 7.000 kr. um mánaðin við ljós, hita og innbúgvi. Skriva til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1654

TIL LEIGU
Lítil íbúð/2 verilsir við atgongd til køk frá 1. sept. í Leirvík.
Tlf. 443188/281051

UNGUR SJÓMAÐUR
søkir íbúð í Havnini. Fari vál um og gjaldi rættstundis.
Ring 260417/327194

KAMAR YNSKIST
28 ára gamal maður við føstum arbeiði søkir kamar ella íbúð í Vestmanna. Drekkur og roykir ikki.
Tlf. 509436

KANN NAKAR HJÁLPA
okkum við eini íbúð? Vit eru eitt par við einum barni, men hava einki at búgva í! Helst við tveimum kømurum. Prísur max. 6.000,-
Ringið 513407 eftir kl. 18

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
Íbúð ella hús ynskist til leigu, fyri rímiligan prís. Helst í Tórshavn. Vit eru eitt par við einum barni, sum fegin vilja flyta til Føroyar, umleið 1. december ella skjótast gjørligt eftir hetta. Vit eru friðarlig, fara væl og gjalda til tíðina.
Tlf. 0045 35855545/0045 22453382/0045 22811045

YNSKIST TIL LEIGU
Kamar ella lítil íbúð ynskist til leigu sum skjótast í Tórshavn.
Tlf. 212052/361182

ÍBÚÐ YNSKIST
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð í miðstaðarøkinum skjótast møguligt. Fari vál um og gjaldi rættstundis.
Tlf. 254422, Kristina

HÚS Í ÁLBORG TIL LEIGU
Dupulthús 100 fermetrar í Gistrup. 9 km frá miðbýnum og 4 km frá universitetinum. Gott bussamband, góðir innkeypsmøguleikar, stutt til skúla og barnavinarligt umhvørvi. Kostnaður ca 6.000 pr. mánað + ljós/varma (uml. 1.300,-) Fyribils framleigan til 01.09.2004
Tlf : +45 40378411

LÍTIL ÍBÚÐ/STÓRT KAMAR YNSKIST
Ungur maður sóknast eftir lítlari íbúð/stórum kamari í Havn. Havi fast starv. Fari vál um og gjaldi til tíðina.
Ring á 229713

VIT ERU
eitt ungt par ið søkja íbúð / lítil hús í Runavíkar kommunu pr. tann 1. sep. Vit hava fast starv og eru friðarlig og fara vál um. Um tit kunna hjálpa okkum ringið
tlf. 226350

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
í Keypmannahavn til unga lesandi kvinnu søkist beinanvegin! Alt hevur áhuga!
Ring á 361379 ella 269098 Anita

ÍBÚÐ YNSKIST
ung mamma við 5 ára gamlari dóttir ynskir íbúð í Tórshavnar kommunu uml. 1. des. Vit fara sera vál um og gjalda til tíðina.
Tlf. 228811/344604, Sólvá

MUSIKLÆRARI SØKIR ÍBÚÐ
Fulltíðar musiklærari søkir íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Max 4000 kr. Roykir ikki, fer vál um og rindar til tíðina.
Tlf. 227680

HYGG HER!
Lesandi við tveimum børnum søkir hús/íbúð í Fuglafirði ella á Kambsdali.
Tlf. 255901 ella 319901

HEY TIT
Vit eru 2 trúgvandi gentur ið søkja ein 1-2 mans íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit hvørki drekka ella roykja, má helst ikki kosta meiri enn 3.500,-
Ring 220431/333512 – 257605/333180

ÍBÚÐ YNSKIST
Par ynskir íbúð í Havn. Vinarliga ring
503108/315687

ELDRI HÚS Í TÓRSHAVN TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, verða húsini í Eiriksgøtu 17 seld. Húsini eru í trimum hæddum, uml. 48 fermetrar hvør, og eru tvær hæddir innrættaðar. Stovuhædd: 2 kømur, stova, køkur og baðiverilsi. Loftshædd: 2 kømur, stova, køkur og wc. Kjallarin er ikki innrættaður.
Áhugað kunnu ringa 227647

Í SANDOYNNA AT FERÐAST!
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru eisini vælegnaði til bólkar. Nærri færttist á
tlf. 361061 ella 361334

HEY
er tað nakar, ið hevur eina lítla íbúð ella stórt kamar at leiga tveimum ungum gentum. Vit ganga á handilsskúla, fara væl um, roykja og drekka ikki.
Tlf. 333512/533512

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
til ikki roykjara frá 1. sept. í Tórshavn ella nærhendis.
Tlf. 258821 eftir kl. 17

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Vit eru eitt par í 20-unum við einum bari og vit søkja eftir størri íbúð ella hús til leigu í Tórshavn. Bæði hava fast arbeiði og gjalda til tíðina.
Tlf. 212660

ÍBÚÐ YNSKIST
22 ára gomul genta søkir íbúð í Havn. Alt hevur áhuga.
Tlf. 260422

ÍBÚÐ Í KBH TIL FRAMLEIGAN
84 fermetra íbúð í Kbh. til framleigan frá sep. 2003 til jan. 2004.
Tlf. 508004

HÚS Í SANDAVÁGI
Miðalstór hús í Sandavági til leigu fyri 5.000 kr. um mánaðin.
Tlf. 533933

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158 ella 313799

SUMMARFRÍ Í EGNARI ÍBÚÐ Í BERGEN?
Íbúð, við stak góðum útsýni, beint við fríttíðarøki við lítlari baðistrond, 5-10 min. frá atløguplássinum hjá Norrønu í Bergen, til leigu í eina ella fleiri vikur í senn.
Tlf. 447942

ÍBÚÐ Í BERGEN TIL LEIGU
Fult møblerað íbúð, við stak góðum útsýni, beint við fríttíðarøki við lítlari baðistrond, til leigu frá 15. sept.
Tlf. 447942

KAMAR
ella lítil íbúð ynskist í Eysturoy í 1 ár, helst nær við Kambsdal.
Tlf. 222359

KOLLEGIUKAMAR Í ODENSE
til framleigan frá 1. sept. 03 til 01. jan. 04.
Tlf. 229597

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn. Eri 26 ár, royki ikki, eri friðarligur og havi fast arbeiði. Gjaldi til tíðina.
Tlf. 210727

STÓRT KAMAR YNSKIST Í HAVN
Eri friðarlig, royki ikki, havi fast arbeið og gjaldi til tíðina. Vinarliga ring
Tlf. 361452

Dansur

STUTT SKEIÐ Í BREAKDANSI
verður í Tórshavn frá týsdegnum 26. august til leygardagin 30. august tveir tímar hvørt kvøld. Lægsta aldursmark 14 ár. Lærari er proffesionellur breakdansari úr Onglandi.
Tilmelding á telefon: 214433

FØROYSKUR DANSUR
verður í Øravík tann 23. august kl. 20.00. Kostnaður íroknað borðhald kr. 180,- bert føroyskur dansur kr. 80,- Tilmelding hjá dansifelagumm ella Hotel Øravík tlf. 371302. Øll eru vælkomin.
Tlf. 371302

Dýr

AKVARIUM
145 l. við tilhoyri til sølu fyri 1200,-
Tlf. 317991

MARSVÍNAUNGI
(hon) ynskist.
Ringið 321702

KETTLINGAR
Fittir kettlingar kunnu fáast við at heintast.
Tlf. 252693

HUNDAHVØLPAR
Golden Retriever/Border Collie verða latnir til djóravinir umleið tann 8. oktober.
Tlf. 445115 ella 509115

SVARTUR FRENSUR
3 mðr. gamal, reinligur, verður latin djóravini. Hesin var eftir av trimum kettlingum og nú vil mamman ikki vita av honum. Hjálp!
Tlf. 315622

TIL SØLU
15 hønur og 1 hani 1 1/2 ára gamlar.
Tlf. 452008

MARSVÍNAUNGAR
Tríggir fittir marsvínaungar til sølu fyri 100,- stk.
Tlf. 266575, Norðasta horn

MARSVÍN
verður latið djóravini, tað er ein hannur og er hálv angora.
Tlf. 448226/265170

BORDER COLLIE HVØLPUR
Ektaður Border Collie hvølpur, 16 vikur gamal. Av góðum seyðahundaslag til sølu.
Tlf. 267090, Glyvrar

MARSVÍN
(hann), fæst við at avheinta tað. Búr fylgir við.
Tlf. 318202

EIN HÁLVVAKSIN
grá/hvítur kettlingur er horvin í Hornabø 17. august. Kennist við navnið Pingo. Um nakar hevur sæð hann, vinarliga ring
tlf. 312069

HYGG HER!
Ein fittur svartur/hvítur kaninungi til sølu.
Tlf. 260650

TIL SØLU
Svart, hvítt og brúnt marsvín við búri og transportkassa til sølu.
Tlf. 261029

TVEIR UNDULÁTAR
við búri og øllum tilhoyri til sølu fyri 700,- Bert til djóravinir.
Tlf. 318217 ella 518217

KETTLINGAR
Tveir kettlingar, frensur og ketta, kunnu fáast.
Tlf. 421527

HUNDAHVØLPAR
7 fittir hundahvølpar vrða latnir til djóravinir í viku 40, ein er brúnur og hvítur, seks eru svartir og hvítir.
Tlf. 322193

Fundir

AÐALFUNDUR
Aðalfundur felagsins verður leygardagin 6. sept. kl. 14.00 í Bygdarhúsinum.
Vestmanna Arbeiðarafelag

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Køliskap til sølu fyri kr. 500,-
Uppvaskimaskina kr. 1500,-
Tlf. 229011 / 312503

TIL SØLU
Lítið frystiskáp til sølu fyri kr. 2.000,- Nýprísur 2.800,- bert 8 mðr. gamalt.
Tlf. 456376 eftir kl. 18

TIL SØLU
Frystiskáp 500 kr. Ein 12 pers. Bosch uppvaskimaskina 500 kr. og ein 6 pers. uppvaskimaskina 500 kr. Ein AEG vaskimaskina 500 kr.
Tlf. 322610

ZANUSSI
vaskimaskina fæst við at avheinta hana (pumpan er farin).
Tlf. 441381

TIL SØLU
Eitt Vestfrost frystiskáp h. 185, d. 60, b. 60, fyri kr. 1.000,-
Tlf. 312926/252632

BOSCH
vaskimaskina í góðum standi til sølu fyri 1.200,-
Tlf. 448841 eftir kl. 18

TIL SØLU
12 ára gomul ikki lágorku frystiboks til sølu fyri 500,-
Tlf. 215556

Innbúgv

TIL SØLU
Rimasong til sølu fyri kr. 700,-
Tlf. 229011 / 312503

TIL AVHEINTINGAR
Reolsystem (148x153) og kommoda við 3 skuffum í góðum standi fáast fyri einki.
Tlf. 315062

YMIST TIL SØLU
Brúkt búnýti, plastikilot, taskur, lampur, fotorammur uttan glas, gardinstengur, persiennur, spegl, skótútgerð, brævbakkar, permar, hattahill, garderobu stativ, meturmál av gongsløpara, skrivimaskinborð, sjónvarpsborð og mangt annað.
Ring 215570 og avtala tíð

YMIST TIL SØLU
Ungdóms sovisofa, longd 200 cm. útsligin 140 x 200 cm. 2.500 kr. ella boð.
Sofasett 3 + 1 + 1 pluss borð til sølu fyri 2.000,- ella boð.
Tlf. 215570 ella 522070

STOVUBORÐ
Stórt teakborð, stødd 150 x 100 cm. + eyka pláta 50 cm. til sølu fyri kr. 500,-
Tlf. 312864

SOVISOFA TIL SØLU
Vøkur ráhvít sovisofa til sølu fyri kr. 3.000,- Nýprísur 4.200,- bert 8 mðr. gomul.
Tlf. 456376 eftir kl. 18

TIL SØLU
Sofaborð við kaklum, 1 hornaborð við kaklum, fýra sektións reolsystem – alt úr myrkum træi – bíliga til sølu.
Tlf. 315453/283948

HVÍTT KLÆDNASKÁP
til sølu fyri 200,-. Song 200 x 90 til sølu fyri 300,-
Tlf. 214142

TIL SØLU
Antik kommoda frá 1880 til sølu um hóskandi boð fæst.
antilkomoda@hotmail.com

SONG TIL SØLU
90 x 200 cm. song úr furutræi við botni og madrassu til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 317862 eftir kl. 18

SPÍSIBORÐ
(antik) stødd 80 x 115 cm. 5 stólar fylgja við, alt í góðum standi, til sølu.
Tlf. 314363 eftir kl. 17

SKRIVIBORÐ TIL SØLU
h. 100 cm, d. 60 cm, l. 120 cm er úr ljósum træi. Kostnaður 200 kr.
Tlf. 441180

SOFUR TIL SØLU
Leður sofur 3 + 2 bíliga til sølu.
Tlf. 361502/252841

KLÆDNASKÁP
Stórt hvítt klædnaskáp til sølu fyri 200,-
Tlf. 214142

TRÆSONG
Sera góð lakerað træsong 90 x 207 cm, við skúmgummi madrassu, bíliga til sølu.
Tlf. 213058

BRÚSUKABINA
90 x 90 cm. og eitt toiletmøbil, vask við skáp undir, b. 60, d. 45, spegl omanfyri við hill og ljós, verður selt bílga.
Tlf. 448031

BOXMADRASSA TIL SØLU
Ein boxmadrassa 1.20 m. við toppmadrassu og beinum, óbrúkt, kostnaður 1.500 kr.
Tlf. 215878/375858/447562

EITT
dekktoyskáp til sølu vegna plásstrot. Fæst við at avheinta tað.
Tlf. 361372/361464

KAKLASOFABORÐ
3 mðr. gamalt, til sølu, kostaði 2.000,- sum nýtt, selist fyri kr. 800,-
Stødd 70 x 140 cm.
Tlf. 313601

SOFA TIL SØLU
2-pers. leðursofa, brún, 3.000,- kr.
Tlf. 316451

Lutaseðlar

KLAKSVÍKAR BADMINTONFELAG
11. dráttur var mánadagin 18. august: Seðil nr. 1185, seðil nr. 1005. 12 dráttur verður 25. august. Allir seldir seðlar spæla við hvønn mánadag! Vinningarnir fáast við at ringja
Tlf. 456731

TÓRSHAVNAR ÍTRÓTTARRÁÐ
Úrslit av drátti 4. august 2003. Hesir seðlar hava vunnið: Nr. 1) 16963 2) 1261 3) 9499 4) 18365 5) 1384 6) 6736 7) 2661 8) 9451 9) 5405. Vinnararnir vera bidnir um at seta seg í samband við Kristionnu á tlf. 312380, 319017 ella 227717.
Tórshavnar Ítróttarráð

Pløgg

TIL SØLU
Sera flottur brúðarkjóli, hvítur, draperaður, við tyl og perlum. Stødd 38. Nýprísur 6.400 kr. Selist fyri 2.000 kr.
Tlf. 311430

TIL SØLU ELLA LEIGU
Sera vakur, langur, ráhvítur kjóli við longum viðum ermum, stødd 36-38. Kr. 2.000,- ella boð.
Tlf. 215570

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
str. 34 (jakki, toppur, niðurdeilur og skógvar str. 39) fyri kr. 1.000,-
Tlf. 318279

KONFIRMATIÓNSKJÓLAR
2 konfirmatiónskjólar, Lilly model, heilt bíliga til sølu. Annar er str. 46 við jakka til – hin er str. 36. Skógvar kunnu fylgja við.
Tlf. 315960/515960

TIL SØLU
Barnabrúðarklæðir til dreingir. 1 hvítur 1-2 ár, 1 svartur 3-4 ár, við butterfly, teir hava sleb og eru av silki, lítið bróktur.
Tlf. 313940

TIL SØLU
Lítið bróktur niðurdeilur og toppur frá Pau til sølu fyri 1800 kr.
Tlf. 423258

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Kjóli við stuttum jakka v/ ermum, jakkin er silki og kjólin silki um yvirpartin, str. 40-42, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 310634 ella 220238, Helena

Samband

EINLIG KVINNA
ynskir samband við einligan mann í aldrinum 48-54 ár, sum ikki nýtir nakað serligt av spiritus, sum kann vera góður við meg. Um tú hevur eina mynd er tað ikki verri, ikki tí, tað er ikki útsjóndin, sum hevur nakað at siga.